# Marianne Florman vitjar

**Marianne Florman, vertur í heilsusendingini Ha' det godt á Danmarks Radio, vitjar í hesum døgum í Føroyum. Her heldur hon fyrilestur, og kannar sær møguleikarnar fyri at gera eina Ha' det godt-sending**

VITJAN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tvær ferðir evropameistari við danska landsliðnum í kvinnuhondbólti, og núverandi fyrilestrahaldari og sjónvarpsvertur í heilsusendingini á Danmarks Radio, Ha' det godt, Marianne Florman, vitjar í hesum døgum í Føroyum.

Hetta er hennara fyrsta vitjan á oyggjunum, og er hon boðin higar at halda fyrilestur hjá Føroya Tele um samstarv.

Umframt hetta, hevur hon eisini valt at steðga í Føroyum nakrar dagar, har hon ætlar sær at uppliva eitt sindur av oyggjunum og lodda dýpið fyri, hvat heilsa og tað, at vera sunnur, merkir fyri føroyingar.

- Eg havi eisini hugsað um at gera eitt lítið kanningararbeiði, og møguliga koma til Føroyar at gera eina av Ha' det godt- sendingunum, sigur Marianne Florman.

Í dag arbeiðir hon dagliga sum sjónvarpsvertur, lærari, fyrilestrahaldari og rithøvundur. Men áðrenn hon á fyrsta sinni royndi seg sum sjónvarpsvertur, var hon longu kend sum hondbóltsspælari.

Í 1990 varð hon úttikin til danska kvinnuhondbóltslandsliðið, og var hon á liðnum tá tær í 1993 vunnu silvur í heimsmeistarakappingini, í 1994 vunnu EM-gull í Týsklandi og tá tær í 1996 vunnu gull í bæði EM og OL.



*Fyrrverandi landsliðsleikari í hondbólti, sjónvarpsvertur í Ha' det godt á DR, rithøvundur og fyrilestrahaldari í øðrvísi umhvørvi. Marianne Florman vitjar í Føroyum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Leitar eftir næmingum

Umframt at Marianne Florman skal halda fyrilestur í Føroyum, hevur hon eisini eini onnur ørindi her.

- Eg eri eisini lærari á Bosei ítróttareftirskúlanum, og tí royni eg eisini at reklamera eitt sindur við hesum skúlanum. Bosei er ein ítróttareftirskúli, sum undirvísir millum annað í judo, karate, taekwondo, japanskum og nógvum øðrum. Og vit fara at byrja eitt nýtt hold í januar, so nú royni eg at finna føroyskar næmingar til okkara skúla, greiðir Marianne Florman frá.

Marianne Florman verður í Føroyum til sunnudagin, og ætlar hon eisini at njóta hesa tíðina til fulnar.

- Eg vónaði at sleppa runt ein túr í oyggjunum og síggja eitt sindur av hvørjum. Og so eri eg eisini so heppin, at tað er so lekkurt veður í morgun. Hetta er ein fantastisk sjón fyri eygað, sigur Marianne Florman.



# FAMILY við CANAL+ TOTAL
## Tann ultimativi sjónvarps-pakkin

FAMILY við CANAL+ TOTAL er tann totala sjónvarpsupplivingin. Tann ultimativi pakkin við avgjørt bestu rásunum – bæði talgildar og HDTV: Tú fær bestu donsku rásirnar frá LOCAL-pakkanum, allar tær útlendsku rásirnar frá FAMILY-pakkanum og ikki færri enn 13 einastandandi HDTV-rásir í ótrúliga høgari góðsku. FAMILY við CANAL+ TOTAL gevur samstundis óavmarkaða atgongd til íalt 11 eksklusivar rásir frá CANAL+ við tí besta innan ítrótt, nýggjastu biograffilmarnar og tær best umtóktu røðirnar. FAMILY við CANAL+ TOTAL er tann størsti og yvirhøvur allarbesti sjónvarps-pakkin við teimum 82 bestu donsku og øðrum útlendsku rásunum og við mest HDTV samlað í einum pakka.

SERPRÍSUR
Fyrr 449,-
Nú 409,- um mánaðin*

FAMILY MED CANAL+ TOTAL 449 kr./md.*
HDTV-kanaler

* Hálvárlig kort-tænasta kr. 389

Canal Digital

**El-In**
Klingrugarður 8
700 Klaksvík
Tel. 474500

**G.F. Elektronik**
Birnugøta 31
100 Tórshavn
Tel. 310254

**MP Teknik**
Klaksvíksvegur 12
700 Klaksvík
Tel. 459089

**Opus**
Heiðavegur 3
620 Runavík
Tel. 479999

**Radio-Service**
Fossavegur 99
900 Vágur
Tel. 213500

**Radiohandilin**
Niels Finsensgøta 16
100 Tórshavn
Tel. 318277